Ítróttarfelagið FRAM 30 ár:

# Stórleikatíðin hjá fela

**12. januar í ár vóru 30 ár liðin síðan Ítróttarfelagið FRAM í Havn varð stovnað. Stórleikatíðin hjá felagnum var í 70-unum. Felagið er framvegis virkið og hevur ætlanir um at flyta upp í 2. deild í ár**




*Álvur Danielsen hevur við trúfesti og áhaldni hildið lív í felagnum. Hann var eisini formaður í felagnum í nógv ár*

ÍTRÓTTARFELAG

*Lagt til rættis:*
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ítróttarfelagið FRAM hevði 12. januar í ár 30 ára føðingardag. Felagið varð stovnað sunnudagin 12. januar 1975.

Stovnandi aðalfundurin varð hildin heima hjá Jørleif Næs í Villumsgøtu henda dagin. 11 mans vóru á fundinum, teir vóru: Karsten Clementsen, Børge B. Hansen, Eyðfinn Hansen, Leivur Hansen, Odmar Kúrberg, Páll Kúrberg (sáli), Klæmint Ludvig, Leivur Müller, Birgar Niclasen, Jørleif Næs og Rógvi Poulsen.

Samtykt varð at seta á stovn fótbóltsfelag undir heitinum "Ítróttarfelagið FRAM". Hetta skuldi vísa seg at vera skilagott, tí longu árið eftir varð eisini ein borðtennisdeild sett á stovn. Miðskeiðis í áttatiárunum varð virksemið hjá felagnum uppaftur meira víðkað til at eisini at fevna um flogbólt.

Flogbóltsdeildin skipaði seg seinni sum sjálvstøðugt felag, men varðveitti tó upprunanavnið. Borðtennisdeildin fekk somu lagnu og reis upp aftur sum sjálvstøðugt felag undir navninum "Tór". Bæði feløgini eru framvegis virkin.

Í fyrstu nevndini hjá FRAM sótu: Jørleif Næs, formaður, Børge B. Hansen, næstformaður, og Rógvi Poulsen, kassameistari.

FRAM luttók fyrstu ferð í landskappingini í fótbólti í 1975 við einum liði í meðaldeildini. Henda kappingin var skipað í tveimum bólkum, A og B.




*Fótfóltsliðið hjá FRAM í 1975. Aftara røð f.v.: Kristjan á Neystabø, Klæmint Ludvig, Jørleif Næs, Ronald McIntosh, Jógvan Gregersen, Páll Kúrberg, Rógvi Poulsen og Napoleon í Lon*
*Fremra røð: Eyðfinn Hansen, Børge B. Hansen, Líggjas Husgaard, Leivur Hansen og Christian Poulsen*